Dagført juli 2023

sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# VEGLEIÐING TIL SAMSTARVSSKJAL

**Vegleiðing til einstaku teigarnar**

**TEIGARNAR 1-7 SKULU DAGSTOVNUR/SKÚLI ÚTFYLLA**

**Teigur 1. Dagfesting fyri Sernámsfundi**

Her setur dagstovnur/skúli dagfesting á Sernámsfundi, tá samstarvsskjalið skal viðgerast.

**Teigur 2. Navn á dagstovni/skúla**

Í hesum teigi upplýsa dagstovnur/skúli navn á viðkomandi dagstovni/skúla, telefonnr., teldupost og kontaktpersóni. Eisini skal upplýsast, hvør luttekur á sernámsfundi frá viðkomandi dagstovni/skúla.

**Teigur 3. Samstarv við Námsfrøðiliga Ráðgeving (dagstovnur) ella Førleikastovu (skúlar)**

Áðrenn dagstovnar og skúlar venda sær til Sernám er tað týdningarmikið, at dagstovnur/skúli royna at finna fram til loysnir lokalt, tvs. at dagstovnar í samstarvi við viðkomandi Námsfrøðiliga Ráðgeving samstarva um átøk í einum máli at finna loysnir, og at skúlar í samstarvi við viðkomandi Førleikastovu samstarva um átøk í einum máli.

Í hesum teigi skal upplýsast, hvørji átøk ein dagstovnur hevur tikið stig til í samstarvi við Námsfrøðiligu Ráðgevingina og hvørji átøk ein skúli hevur tikið stig til í samstarvi við Førleikastovuna.
Upplýs, hvat hevur virkað væl og hvat hevur virkað minni væl.

Upplýs eisini, nær málið er tikið upp á fyrsta sinni við Námsfrøðiligu Ráðgevingina, tá talan er um dagstovnar og nær málið er tikið upp á fyrsta sinni við Førleikastovuna, tá talan er um skúlar.

**Teigur 4. Samstarv við Sernám ynskist um**

Her skal ásetast, um samstarv við Sernám ynskist um einstaklingar (tvs. barn); bólkar (t.d. stova, flokkur ella starvsfólkabólkur) ella annað samstarv á skúla-/dagstovnaøkinum (t.d. framløgur, upplegg og skeið).

**Teigur 5. Lýs støðuna, sum tit ynskja ráðgeving og samstarv um**

Í hesum teigi lýsa dagstovnur/skúli støðuna, sum ráðgeving og samstarv skal snúgva seg um. Gott er at útgreina støðuna í so stóran mun sum gjørligt við dømum.

**Teigur 6. Annað viðkomandi tilfar**

Her skal upplýsast, um annað viðkomandi tilfar er til taks í sambandi við málið, ið kann varpa ljós á støðuna.

**Teigur 7. Hvørjar væntanir hava tit til samstarvið við Sernám?**

Dagstovnur/skúli kunnu her upplýsa, hvat tey ynskja og vænta kemur burturúr samstarvinum við Sernám.

**TEIGARNAR 8 TIL 12 SKULU FORELDUR ÚTFYLLA**

**Teigur 8. Navn og bústaður hjá barni**

Í hesum teigi upplýsa foreldur navn á barni, p-tal og bústað. Eisini skal upplýsast navn á stovu, um talan er um barn á dagstovni ella viðkomandi flokk, um talan er um skúlabarn.

**Teigur 9. Upplýsingar um foreldur/verja**

Her skulu foreldur/verji upplýsa um foreldramyndugleika ella verja. Eisini skal upplýsast p-tal og bústaður hjá foreldrum.

Um tørvur er á tolki, skal tað upplýsast her og eisini skal upplýsast, hvat tungumál tað snýr seg um.

**Teigur 10. Lýs støðuna, sum tú/tit ynskja ráðgeving og samstarv um**

Í hesum teigi lýsa foreldur/verji støðuna, sum ráðgeving og samstarv skal snúgva seg um. Gott er at útgreina støðuna í so stóran mun sum gjørligt við dømum.

**Teigur 11. Hvørjar væntanir hava tit til samstarvið við Sernám?**

Foreldur kunnu her upplýsa, hvat tey ynskja og vænta kemur burturúr samstarvinum við Sernám.

**Teigur 12. Undirskrift og samtykki**

Tað kann verða hent og neyðugt at fáa upplýsing frá øðrum stovnum og myndugleikum, um barnið/foreldur fyrr hava fingið hjálp frá t.d. kommunulækna, heilsufrøðingi (Gigni), Landssjúkrahúsinum, Almannaverkinum, Barnaverndartænastuni, Kommunalu ráðgevingini (NR) ella øðrum. Í hesum teigi vátta foreldur/verji, at tey geva loyvi til, at Sernám kann fáa upplýsingar frá øðrum stovnum og myndugleikum. Samtykkið er galdandi í 1 ár frá dagfesting í teigi 12.

SERNÁM

Á FRÆLSINUM 32 . POSTSMOGA 2036 . FO-110 TÓRSHAVN . TLF 360200 . SERNAM@SERNAM.FO . WWW.SERNAM.FO